

## Lyngby mist av leiðsluni

Fyri nøkrum vikum síðani tóktist Lyngby hava beina kós ímóti donsku superliguni, men tveir javnleikir á rað hava havt við sær, at liðið hevur mist burtur av síni tryggu leiðslu. Lyngby er tó fimm stig frammanfyri næstu liðini, og tað eru bert fýra dystir eftir at spæla, so tað skal ganga illa hjá liðnum, har Christian Lamhauge Holst er ein av spælarunum, um uppflytingin skal kiksa. Um vikuskiftið spældi Lyngby javnleik ímóti Kolding.

## Benitez vil hava Malouda

Enskir fjølmiðlar skriva, at Liverpool-venjarin Rafael Benitez roynir at fáa franska landsliðsspælaran Florent Malouda til felagið. Malouda spældi við á franska landsliðnum, sum kom í HM-finaluna í fjør, og dagliga spælir hann fyri franska felagið Lyon. Liverpool skal hava givið Lyon eitt boð upp á 110 milliónir krónur fyri Malouda, sum varð kosin til ársins spælara í Fraklandi seinasta kappingarár.

NSÍ-B71 3-0 (1-0):

# NSÍ sigursrøðin heldur fram

**Fjórði sigurin á rað varð vunnin ímóti sandoyingum, sum vóru so mikið jánkasligir, at teir tóktust fríganga um hvítusunnuna**

NSÍ

B71

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er háspenningur í luftini í og kring NSÍ. Í gjár vann fótbóltsflaggskipið fjórða landskappingardystin á rað, og nú er bara eitt stig fram í oddin.




*Øssur Dalbúð hevur júst økt um NSÍ leiðsluna til 3-0 ímóti B71. At talan er um nýtt NSÍ ættarlið sæst væl.*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Um teir gulu og svørtu megna avbjóðingina at lyfta seg heilt upp á toppin, bar ikki til at staðfesta 2. hvítusunnudag. Mótstøðuliðið av Sandi kundi brúkast sum barometur fyri at finna út av toppdygdunum hjá NSÍ.

Sandoyingar tóktust hava fingið skeiva beinið fyrst út um songarstokkin – um teir yvirhøvur vóru útpurraðir! Teir vóru lítið nærlagdir í nærdystunum, vunnu ongantíð næstu bóltarnar, fluttu seg ikki fyri hvørjum øðrum, tá ið teir høvdu møguleika at fara í álop, og tá ið teir royndu við longum sendingum fram til einsamalla Clayton Soares bar illa til, tí NSÍ miðverjan tók sær væl av vandamikla manninum.

Eftir steðgin varð Símun Hansen í roynd at fáa størri tyngd í álopspartin settur fram við síðuna av Clayton. Tað tóktist bøta eitt vet um tann partin, men bara í eina lítla løtu, og tá ið NSÍ hevði økt um leiðsluna til 2-0, var púrt eingin broddur í gestunum.

Í NSÍ miðverjuni var nýggj manning. Liðformaðurin Óli Hansen, sum hevur verið mest eyðsýndi NSÍ spælarin higartil í ár, noyddist orsaka av sjúku at geva avboð. Einar Hansen varð fluttur av vongverjanum og í miðverjuna, har hann saman við einum øðrum ungum manni, Johan Troest Davidsen, greiddi uppgávuna til fulnar, meðan veteranurin Sjúrður Jacobsen tók sær av vongverjanum.

### Óneyðugur spenningur

Heimaleiðslan var bara eitt mál, inntil tað restaði minni enn ein hálvur tími. Tá ið munurin er so lítil, er møguleiki fyri, at mótstøðuliðið burtur úr ongum skal fáa mál og harvið stinga av við einum stigi.

Tí varð tað óneyðuga spennandi hjá heimaáskoðarunum. Andy Olsen setti hol á, tá ið hann tamdi eftir blokeraða skotroynd og hegnisliga lyfti upp um U 21 málverjan Símun Røgva Hansen.

So svam NSÍ í leikligari yvirvág og nær við og næstan støðum, sum stóðust av góðum flytingum og ofta fínum eyga fyri at spæla í tómrúmini. At teir ikki megnaðu at umseta yvirvágina til økta leiðslu komst partvís av, at B71 var væl skipað kring egnan brotsteig. Men tað komst eisini av, at NSÍ hevur trupulleikar í at umseta leikliga yvirvág til úrtøku.

Hetta síðsta hevur kostað higartil í ár, og tað kosaði eisini fyrsta stóra tíman í gjár. Andersson, Elttør og Frederiksberg eru keyptir til Løkin fyri at skjóta mál, men tað er so sum so við tí partinum.

Andersson fekk aftur hesa ferð allar møguleikarnar í deyðbóltsstøðum. Eftir stórt korter var tætt við, at hann sendi fríspark í málið, men heldur ikki meiri enn tað.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð brasilski toppskjúttin feldur, tá ið hann sneiddi framvið B71 verjuni. Dómarin bríkslaði fyri brotssparki, sum álopsspælarin sjálvur umsetti til mál.

So var tað avgjørt, at øll stigini fóru at verða við Løkin. Tá ið tað restaði lítil løta skifti NSÍ venjarin tríggjar ungar spælarar inn. Hann skuldi kanska havt gjørt onkra av skiftingunum fyrr enn so. Øssur Dalbúð, sum hevur gott máltev og leygardagin hevði skorað á næstbesta liðnum, staðfesti heimasigurin í síðstu sekundunum, tá ið hann umvegis tvørtræið og eftir innlegg úr vinstru frá arbeiðssama Hjalgrími Elttør skoraði til 3-0.

Tá høvdu sandoyingar longu pakkað saman og staðfest, at ímóti NSÍ tykjast teir fáa lítið burtur úr í ár. Tíðliga í ár mistu teir á heimavølli javnleikin á stokkinum, og hesa ferð høvdu teir einki at siga.

Í NSÍ leguni var hugaliga staðfestingin, at tað nú bara er eitt stig upp á toppin. Tað stigið átti tað at verið møguleiki fyri at tikið, sum tað líður út á summarið!

**Norðoyatunnilin og Vágatunnilin**



**25% bíligari**

**4. juni verður nógv bíligari at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar báðar.**

Ferðandi í Vága- og Norðoyatunlinum, ið ferðast stakferðir ella við kubba, skulu gjalda umleið 25 prosent minni fyri ferðir sínar frá 4. juni 2007. Árshaldið lækkar 10 prosent frá sama degi.

Avslátturin er sjálvvirkandi fyri tey, ið hava hald frammanundan, soleiðis at minni verður tikið fyri hvønn túrin, eftir at prísurin er lækkaður. Hetta svarar til, at fyri hvørjar 4 túrar, ið vóru eftir á kontuni, verður 1 túrur lagdur afturat.

Prístalva

| Søluprísur (kr) | 1 túrur kr t/r | 5 túrur kr t/r | 20 túrur kr t/r | 40 túrur kr t/r | Árshald kr/mðr |
|---|---|---|---|---|---|
| Bilar upp til 3500 kg, styttri enn 6 m | **130** | **104** | **78** | **65** | **900** |
| Kostnaður fyri hald | | 520 | 1.560 | 2.600 | 10.800 2) |
| | | | | 1.800 1) | - |
| Bilar millum 6 og 12,5 m | **350** | **280** | **210** | **-** | **-** |
| Kostnaður fyri hald | | 1.400 | 4.200 | - | |
| Bilar yvir 12,5 m | **530** | **424** | **318** | **-** | **-** |
| Kostnaður fyri hald | | 2.120 | 6.360 | - | - |
| Depositum fyri kubba | | **300** | **300** | **300** | **300** |

Gev gætur:
1) Samlaður prísur fyri hald við 40 túrum, tá ið mánaðaravsláttur verður roknaður uppí. Mánaðaravsláttur 400 kr verður latin privatkundum, ið koyra minst 20 túrar í einum kalendaramánaða, við sama bili í sama tunli. Sparingin er tá 65%
2) Samlaður prísur fyri árið. Haldið verður teknað fyri 1 ár í senn og kann ikki sigast upp. Gjaldast skal mánaðarliga forút gjøgnum GS-avtalu. Árshald verður teknað fyri hvønn tunnilin sær.

Orsakað av einari vaksandi arbeiðsbyrðu hjá avgreiðslu okkara, hava nevndirnar samtykt, at avgreiðslugjøld skulu takast fyri ávísar tænastur.

**Nýggju avgreiðslugjøldini eru:**

- 250 kr. fyri fyribilsflyting av kubba millum bilar.
- 50 kr. fyri avgreiðslu av túrum hjá bilum, sum hava hald, men hava koyrt uttan kubba, ella har haldið hevur verið í eftirstøðu.
- 15 kr. fyri kontuavrit og túrútskrift.

Omanfyristandandi broytingar eru framdar í viðskiftatreytum felagsins og eru galdandi frá 25. juni 2007.

Sí eisini viðskiftatreytirnar á www.tunnil.fo.

www.sansir.fo

VÁGATUNNILIN NORÐOYATUNNILIN

Skansavegur 7, Postrúm 1010, FO-110 Tórshavn, Tel 350200, Faks 350201, www.tunnil.fo